## Íslendskt nei til ES

Triði hvør íslendingur tekur undir við, at Ísland skal fara upp í Evropasamveldið, men annar hvør er ímóti. 17 prosent eru hvørki fyri ella ímóti. Tað er úrslitið av einari meiningakanning, sum Gallup hevur gjørt fyri íslendska ídnaðarfelagið, og sum íslendsku fjølmiðlarnir endurgeva. Spurd, hvussu tey høvdu atkvøtt, um spurningurin um limaskap kom til fólkaatkvøðu nú, svaraðu 61,5 prosent, at tey helst ella heilt vist høvdu atkvøtt ímóti. 38,5 prosent svaraðu hinvegin, at tey helst ella heilt vist høvdu atkvøtt fyri ES-limaskapi.



## Ikki álit á bankunum

Ein nøgdsemiskanning, sum danska brúkararáðið hevur gjørt, vísir, at danir hava fullkomiliga mist álitið á sínum peningastovnum. Í kanningini eru fólk spurd, hvussu tey eru nøgd við tænastuna á 51 ymsum økjum, og her enda bankarnir sum nummar 41. Í teirri tilsvarandi kanningini í fjør vóru teir nummar 31. Lene Espersen, búskapar- og vinnumálaráðharri, sigur við DR, at danir høvdu stórt álit á sínum peningastovnum, til korthúsið rapaði. Hon heldur eisini, at søgur um vánaliga ráðgeving í bankunum hava viðvirkað til, at fólk hava mist álitið á teimum.



# Brodøsurnar fylla høllina

**Ein øðrvísi listaframsýning letur upp fríggjadagin í Müllers pakkhúsi í Havn. Ellivu kvinnur sýna fram tað, sum tær hava lært at gera burtur úr at brúka klæði av ymsum slag og brodera á**

LIST

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Müllers Pakkhús í Havn hevur seinastu árini javnan verið karmur um ymist listarligt virksemi. Har hava verið fleiri framsýningr, men slík listaframsýning, sum letur upp í hesum húsinum, hevur aldrin áður verið, hvørki í Müllere Pakkhúsi ella aðrastaðni í Føroyum.

Myndirnar á framsýningini verða umleið 150 í tali, men myndirnar eru hvørki oljumálningar, vatnlitsmyndir ella tekningar. Felags fyri allar myndirnar eins og koddarnar, taskurnar, baðigardin og annað er, at tær eru úr klæði, ið borderað er á.

Ellivu kvinnur sýna fram tað, sum tær hava lært á skeiði yvir tvey ár hjá donsku listakvinnuni Bettinu Andersen. Tær eru undirvístar í 160 tímar samanlagt.

### Fann útbúgvingina á netinum

Alt byrjaði við, at Majken Hammer, sum nývald forkvinna í Føroya Heimavirkisfelag setti sær fyri at finna okkurt nýtt. Hon fór á internetið at leita og fann tá fram til Bettinu Andersen, sum framt at hava framsýningar undirvísti í nýskapandi brodering.

Tað hevði verið væl dýrari hjá føroyskum við áhuga í hondarbeiði at skula til Danmarkar á skeið hjá henni, og tí fór Majken Hammer at kanna, um tað ikki bar til at fáa Bettinu Hammer at koma til Føroya.

Eg má siga, at eg var eitt sindur ivasom, áðrenn eg kom fyrstu ferð, tí fólkagrundarlagið var so lítið, og eg setti spurnartekin við, um tað fóru at koma nóg nógvar á skeiðið, sigur Bettina Andersen.

Hon fekk beinanvegin annað at síggja, tí samanlagt fullførdu 34 kvinnur grundskeiðið tað fyrsta árið.

Ellivu kvinnur hava fullført útbúgvingina, og eg kalli tær brodøsur. Tað er eitt orð, sum eg sjálv havi gjørt, sigur Bettina Andersen.

Tær hava lært bæði um ymiskt toy, litlæru, litsamanseting, at brodera við maskinu og í hond á toy, metall og annað. Eitt heilt serligt, sum tær lærdu, var at brodera á upploysiligt plast, og tá verkið var liðugt, og tað varð vaskað, var bara broderíið eftir. Tær hava brúkt evni, sum varð brent, og sumt varð skrætt.

Tær vórðu kastaðar út í uppgávur at loysa eftir egnum hugi, men við leiðbeining frá læraranum.

Summar uppgávur byrjaðu við, at tær skuldu lurta eftir tónleiki og lata seg forføra av tónleikinum, tá ið tær gjørdu myndirnar.

Ein uppgáva var at gera modernaðar ikonir við útgangsstøði í tí klassiska, men ikonirnar nýttust ikki at vera religiøsar.

### Alt kann brúkast

Klæðir skapa myndir, sigur Bettina Andersen og peikar á tvær myndir. Á aðrari myndini er broderað á eitt gamalt slips, og á hinum er ein lummi.

Vit síggja eisini myndir, sum gjørdar eru úr gomlum broderaðum koddum ella ljósadúkum. Siðbundið og nýtt saman.

Myndir eru við føroyskum dansi, og myndir eru av landsløgum. Summar hava valt at krøkja onkrar lutir uppí myndinar. Lutir, sum á ein ella annan hátt siga teimum nakað.

Bettina Andersen sigur, at nógv fólk hava verið neilig, tá ið tey hava fingið at vita um hesa listagreinina, men so skjótt tey hava sæð verkini, hava tey broytt hugsan.

### Øll kenna toy

Tað hevur nakað við at kenna aftur, tí tey síggja, hvat fyri toy, ið er brúkt. Sjálv haldi eg henda mátan vera meira spennandi at arbeiða við, tí tilfarið er so ymist, og yvirflatan ikki so eins sum á eitt nú málningum, sigur Bettina Andersen.

Hon rósar næmingum sínum fyri ágrýtni og hugflog. Tað hevur verið stuttligt at undirvíst teimum, og sjálv hevur hon eisini fingið tað burturúr, at hon hungrar eftir at koma í gongd aftur við síni list. Inspirerað av undirvísingini í Føroyum.

Framsýningin letur upp fríggjadagin klokkan 17 og er opin til klokkan 20 tað kvøldið. Opið er allar dagar fram til mikudagin í næstu viku frá klokkan 10 til 20, sunnudagin letur tó ikki upp fyrr enn klokkan 14.

Allar dagarnar verða onkrar av listakvinnunum í Müllers Pakkhúsi og kunnu greiða frá, hvussu verkini eru gjørd.

Tær ellivu listakvinnurnar eru Karin Andreassen, Annelin Dal-Christiansen, Jórun Dánialsdóttir, Majken Hammer, Una Højgaard, Oddný í Lon, Edna Niclasen, Fía Petersen, Malan Rasmussen, Gunnbjørg Rubeksen og Malan Rubeksen.